## Við teimum størstu

Westlife hevur sungið á palli saman við fleiri av størstu tónleikanøvnunum í heiminum. Millum hesi teirra, sum hava framført saman við Westlife, eru Sinéad O'Connor, Mariah Carey, Lionel Richie, Ronan Keating, Roy Orbison, Levin Spacey og Donny Osmond.



## Fýra filantropar

Hvør sum ein eru limirnir í Westlife ídnir at stuðla vælgerandi endamálum. Serliga hava teir stuðlað átøkum, sum eru til frama fyri børn, og eitt nú hava teir savnað pening fyri barnagrunnin hjá Nelson Mandela, Unicef og Children in Need. Seinasta átak teirra í so máta er teirra luttøka á Helping For Haiti-singluni, sum varð send á marknaðin tann 8. februar í ár.

# Størsta popp-brakið



*Mest seljandi tónleikabólkurin hesumegin aldarskiftið. Tað er eitt av heitunum, sum stendur á metlistanum hjá írska Westlife. 7. august í ár standa teir á stóra pallinum á SummarFestivalinum í Klaksvík*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Fyrstu sjey útgávurnar fóru beinleiðis á enska tónatindin, og samanlagt eru tað bara the Beatles og Elvis Presley, sum hava havt fleiri løg ovast á ensku hitlistunum. Westlife er mest seljandi bólkurin í heiminum í hesi øldini. Og leygarkvøldið 7. august oysa teir síni mongu hits út til áhoyrarnar á Vágsbøi í Klaksvík**

TÓNLEIKUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lat tað vera sagt beinanvegin. SummarFestivalurin fær nú sítt største navn nakrantíð á plakatina.

Tað kann vera, at Scorpions er ein risa aktørur í rocksøguni. At Ken Hensley átti sín stóra part av tí besta í 70'unum, meðan Roger Hodgson átti sín líka stóra part av 80'unum. At Barry Gibb hevur skrivað fleiri hitt enn tey flestu, og at Brian McFadden var ein heimsstjørna, tá hann í 2005 var í Føroyum. Men Westlife tekur altso allar hesar við fleiri bátslongdum!

Júst McFadden gjørdist ein heismsstjørna við Westlife, men meðan hansara stjørna er kámað nakað seinastu fýra árini, stendur Westlife enn sum nakað av tí størsta nakrantíð í bretskum poppi. Og tað sigur nú ikki so lítið í einum landi, sum telur Beatles, Oasis, Genesis, Cliff Richard og nógv onnur.

Tíggju ferðir hava teir givið út fløgu. Ein gjørdist nummar 3, tvær nummar 2 og hinar sjey nummar 1 á ensku sølulistunum. Og allar seldu tær platin í Bretlandi. Coast to Coast enntá seks-dupult platin.

Fyrstu sjey single-útgávurnar hjá bólkinum funnu beina leið upp á toppin á ensku hitlistunum, og tað hevur eingin gjørt fyrr. Og tað eru bara the Beatles og Elvis Presley, sum hava havt fleiri #1-hits í Bretlandi í tónleikasøguni yvirhøvur.

### Simon Cowell-produkt

Simon Cowell er í dag væl kendur sum heldur speiski dómarin í American Idol. Har plagar hann í hvøssum vendingum at siga, hvat skal til hjá luttakarunum, um hesi vilja vinna seg fram á altjóða pallinum í eini bransju, har Cowell sjálvur hevur upplivað bæði upp- og niðurtúrar.

Og júst Westlife er helst størsta succéin av øllum, sum Cowell hevur havt við at gera.

Upprunaliga var talan um írskan dreingjabólk, sum bar heitið, IOYOU , og taldi Mark Feehily, Shane Filan, Kian Egan, Derrick Lacey, Graham Keighron og Michael Garrett.

Mamman at Shane helt dreingirnar vera somikið